Í gjár, í dag, ja alla tíð. Eh

E                              A                   E
Í gjár, í dag, ja alla tíð, hin sami Jesus er,
E                                      Fis/H
Hann hjálpir tær, tá ið tú ert í neyð.
    E                                      A                 E
Tá syndabyrðan tyngir teg, Hann kemur tær so nær,
                          H                   E
Tí hann vil bjarga tær frá synd og deyð

Niðurlag:

E7      A                              E
Hann livir, ja hann livir, kann aldri doyggja meir,
     A                             E              H
Og fyri tær hann biðjur, til Gud í himlinum.
     E                            A                        E
Ein náðikelda rein og klár Hans krossi rennur frá,
E                             H                  E
So tann, sum trýr, skal lív frá honum fá.

Hin niðurboygda reisir hann, Hin veiki finnur kraft;
Hin vónleysi kann syngja sigurssang.
Tey blindu síggja, deyvu hoyra, Hin halti ganga kann,
Tey prísa vilja Jesus fram um alt.

Gud býtir sínar gávur út til tey, sum hava trúgv,
So Jesunavnið dýrd og æru fær.
Tá fær hin jarðar-bundna trúgvin Lív í yvirflóð,
Tí Jesus er í orðinum tær nær.